Á Føroya Gjaldstovu er deildarleiðarastarv sum løgfrøðingur leyst at søkja

nú løgfrøðingurin á gjaldstovuni er farin í annað starv

Skipan av deildarleiðarastarvinum:
Deildarleiðarastarvið er skipað beinleiðis undir stjóranum. Deildarleiðarin hevur ábyrgdina av tí løgfrøðiliga uppgávuøkinum – her serliga við atliti til innkrevjing.

Ábyrgdarøki deildarleiðarans:
Viðkomandi, ið settur verður, hevur sum ábyrgdarøki:

1. At tryggja, at arbeiðið á stovninum verður gjørt m.a. sambært løgfrøðiligum ásetingum.
2. At tryggja, at formligi parturin støðugt verður mentur í mun til hinar partarnar av menningarprojektinum.
3. At tryggja, at løgfrøðiliga kunnleikastøðið – serliga hjá teimum, sum arbeiða við innkrevjing, er fullgott.
4. Samskifti við aðrar myndugleikar á innkrevjingarøkinum.
5. Lógararbeiði v.m.
6. Málsviðgerð v.m. av serliga krevjandi málum.

Útbúgving:
Tann, ið settur verður, skal hava prógv sum cand. jur.

Lønarviðurskifti og umsóknir:
Lønarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Búskapar- & Løgfrøðingafelagið og Føroya Landsstýri. Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu sendast til Føroya Gjaldstovu, E. Jalsgøtu, Postrúm 3, 110 Tórshavn í seinasta lagi 18. desember 1995. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til gjaldstovuna, tlf. 14660, Leif Abrahamsen

Ábyrgdarøki stovnsins:
Gjaldstovan førir roknskapir yvir játtanir á figgjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønarutreiðslunum. Í teimum førum, almenn krøv ikki verða rindað til tíðina, virkar gjaldstovan sum almenni innkrevjingarmyndugleikin. Á Føroya Gjaldstovu, ið er stovnur undir landsstýrinum, starvast 35 fólk og arbeiða 15 av hesum við innkrevjing.

Menning av ábyrgdarøki stovnsins:
Í 1994 byrjaði eitt stórt projekt, sum fevnir um at innføra nýggjar skipanir á stovninum, m.a. innan økini Figgjarstýring, Løn og Innkrevjing. Arbeiðið við nýggjum skipanum, sum skal skiljast í merkingini EDV-skipanir, bygnaðar-/starvsfólkaviðurskifti og formlig viðurskifti, fer at røkka inn í árið 1998.

Konsertir í Klaksvík

Næmingar í Klaksvíkar Musikkskúla hava konsertir alla komandi viku

Tað hevur neyvan komið fyri fyrr, at konsertir er dagligur kostur í Klaksvík, men nú uppundir jól verða fleiri tiltøk.

Tær báðar Fiona Parker og Helga Gerðalíð, sum eru lærarar við Klaksvíkar Musikkskúla skipa fyri at næmingar musikkskúlans fara veruliga at royna seg, og spælt verður á ymiskum støðum:

Mikudagin 11. desember kl. 18.00 í Ósáskúlanum verður konsert við teimum, sum hava spælt í nøkur ár.

Týsdagin 12. desember kl. 18.00 í Býráðshøllini við og fyri smábørnum.

Mikudagin 13. desember verða 3 konsertir, kl. 9.00 í barnagarðinum, kl. 10.00 á sjúkrahúsinum og kl. 11.00 á Ellis- og Røktarheiminum.

Hósmorgunin 14. desember hevur bólkurin »Keta« konsert í fimleikarhøllini.

Frígjadagin 15. desember verður tónleikur í Christianskirkjuni.

Framhald av síðu 5

her. Ein má í hvussu er ikki halda, at ein við at flyta til Danmarkar sleppur undan at gjalda skatt. Eg meini heilt avgjørt, at skattalættin fer at muna hjá teimum, sum hava inntøkur og sum kenna skattabyrðuna sera tunga. At flestu av kommununum so eisini kunnu lækka skattaprosentið hjálpir eisini.

jan

SKÁIN
Krydsburger v/ chipsi 35,-
Bilsimatur v/ steiktum eggi 35,-
SKÁ SKÁ grýtoréttur v/ eplamoes 35,-
1/2 heimarunnið v/ chipsi 50,-
1/4 heimarunnið v/ chipsi 30,-
Tvífiða v/ skinku og osti 20,-
Franskur hotdog 20,-
Chips 15,-
Kaffi 10,-
Sodavatn 10,-
Øl 15,-
Minnist til heimkoyringartilboðið á kr. 95,-
SKÁIN
Tlf. 18866 – N. Finsensgøta 20

Internet

Í sambandi við at TFL setir á stovn **Internet skipan í Føroyum**, verður lýst eftir fólki til at uppbyggja, umsita og menna tænastuna.

Arbeiðið kemur í fyrstu atløgu at umfata installatión, rakstur og viðlikahald av verandi útgerð.

Men fyri framman liggur eitt sera spennandi arbeiði at:

- **menna internet umsitingina og tænastuna á TFL**
- **uppseta nýggjar vertir**
- **veita ráðgeving til viðskiftafólk**
- **gera LAN/e-mail uppkoblingar til virkir og stovnar.**

Í tí sambandi er tað ein fyrimunur, um tú hevur hesar førleikar:

- **tú kanst í stóran mun arbeiða sjálvstøðugt og ert nærlagdur/nærløgd**
- **tú hevur kunnleika og royndir innan UNIX**
- **tú hevur kunnleika til WindowsNT, TCP/IP og Internet**
- **tú ert opin og dugir væl at tosa við viðskiftafólk**
- **tú hevur hugsjónir um Internet**
- **tú dugir enskt.**

Útbúgving: EDV-útbúgving ella verkfrøðingur.

Viðkomandi skal vænta at kunna setast til aðrar uppgávur eisini.

Løn samb. sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Áhugaði kunnu venda sær til Ivan S. Simonsen við spurningum á tlf. 11433 lok. 325.

Umsóknir skulu sendast til:

Telefonverk Føroya Løgtings
Postsmoga 27
110 Tórshavn

og verða okkum í hendi í seinasta lagi 18. desember 1995.

Viðmerk á brævbjálvan: **»Internet«**

STEPHANSSONS HUS

VI HAR ALLE SAMMEN ET ANSVAR..

Nýggjársrøðan 31. des. 1994. Hennara hátygn drottning Margretha II av Danmark.

EINKI SÆST TIL AIDS FYRR ENN OV SEINT ER